Tiltøk

Felagið Tórshavn: GONGUTURUR

Sunnudagin 17. nov. kl. 11 verður farið til gongu inn á Sund og vitjað á Sundsverkinum. Vit hittast Millum Gilja, har bussurin steðgar.

Bussleiðin fer av Farstøðini kl. 10.49.

AA-fundir

Leygardagin kl. 17 og 22.30

Sunnudagin kl. 11 og kl. 17. – Kl. 20–21.30 AA-evnisfundur í Tórsgøtu 5.

Mánakvøldið kl. 20 í Tórsgøtu 5.

Felagið Føroyar-Kuba

Opið er soleiðis í Kongagøtu 11, Tórshavn: Mánadag, týsdag, hósdag og fríggjadag kl. 10–12, mikudag kl. 16–18 og leygardag kl. 15–17. Telefon 13016 - Fax 13824.

Javni

Skrivstovan er stongd í viku 46.

Barnabati

Veitst tú, at

– Barna- og Ungdómstelefonin svarar hvønn mánadag frá kl. 16 til 18?

Tlf. nr. er 10645.

Foreldur kunnu eisini ringja og fáa ráðgeving.

Tey, ið svara, hava tagnarskyldu.

Tú kanst vera anonymur.

Hvat kanst tú ringja um?

– Persónligar trupulleikar av øllum slag, t.d. incest, anorexia ella bulimi, alkohol, fyribyrging, royking o. m.a., ella bara hava brúk fyri at tosa við onkran vaksnan.

Barnabati

Føroyingafelagið í Árhus

Vestergade 48 D,
8000 Árhus C.

Húsið er opið mánadag–hósdag kl. 16–18 og fríggjadag frá kl. 21.

Føroyskur skúli fyri børn er annan hvønn leygardag kl. 11.

Føroyskur dansur er annað hvørt fríggjakvøld kl. 21.

Sertiltøk verða lýst á telefonsvararanum tlf. 86-180604.

Føroyahúsið í Keypmannahavn

Vesterbrogade 17 A
Tlf. 31 23 15 87, kunningartelefon, ið sigur frá tiltøkum og fax á tlf. nr. 31 23 15 86

Húsið er opið hvønn dag frá kl. 14–19. Leygardag er tó ikki opið.

Kaffistovan er opin hvønn dag frá kl. 14–19.

Hvønn mánadag kl.17–19 er føroyskt sjónvarp á bandi við Degi og Viku og døgurði fæst til keyps.

Ullvørur, bøkur, fløgur og bond og døgurðamatur fæst til keyps.

Føroyingar í Noregi

Føroyingar og fólk við tilknýti til Føroyar hittast til óformligan hugna fyrsta leygardag í mánaðinum kl. 15 á Kafé Asylet, Grønland 28, í Oslo

Norsk-Færøysk Lag skipar fyri tiltakinum.

Felagið hevur tlf. +47 22 67 48 29

Brúdleyp

Leygardagin 7. des. kl. 18.30 giftast í Kollafjarðar kirkju Majbritt Hansen, Kollafirði, og Zacharias Thomassen, Tórshavn.

Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Kollafirði kl. 19.00. Vinarliga sigið frá áðrenn 1. des. á tlf. 21591 ella 13739.

28. desember giftast í Sandavágs kirkju Tordis Dam og Magnus Johannesen, bæði úr Sandavági, búsitandi í Frederikshavn.

Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, biðjast siga frá á tlf. 32369 ella 32545 ella 098432332 áðrenn 1. desember.

Prógv

Steinar Hansen, Toftum, hevur fingið lærubræv í skrivstovuyrkinum – yvirhøvur (all-round). Hann lærdi í Skemmuni í Havn, lærimeistarar vóru Jákup Jensen og Árni Jensen.

80 ár

16. november verður Dánjal Petur Næs, Nes Hvalba, 80 ár.

Hann er burturstaddur.



© LAS. 1996

KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Marita Dalsgaard
Box 55
625 Glyvrum

Loysnin frá seinastu viku

Loysunarorðið: NEW ZEALAND

F	L	E	Y	G		F	A		S	T	E	I	N	U	R
I	O	T	Á		S	K	R	I	V		S	T	Ú	R	I
S	N	I	M	M	A		I	R	A					R	N
K	G		A	Á	R		Ž	I	M	B	A	B	W	E	
I	D	Á	M	O		B	O	S			T	R	E	I	N
M	A	Y	A		D	A	N				S	E	L	M	A
E	R	R		K	A	J	A	K			T	I	L		V
N	L			A	R	K		Á	S	T	Ø	Þ	I		Þ
N	O	R	Þ	Á	R	A	S	K	A	R	Ð		N	Æ	R
90	P	A		P	A	L	L	A		E	U		G		I
F		N		S			E		Ð	K	R		T	I	
E	I	N	S	T	A	K	I	R				K	O	G	E
L	O	D	N	A		I	V	A	M	Á	L		N	E	T
A	N	A		D	E	S			E		E	B		R	O
G	A	L	A		I	T	A	R	T	A	S	S		I	N
I			A	R	K	A	N	S	A	S		A	K	A	

Hvønn leygardag

verður krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein av niðanfyri nevndu bókum frá Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi *í seinasta lagi hósdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ____«** á bjálvan.

Loysunarorðið: **91**

Navn .....

Bústaður .....

Bygd/býur .....

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

- ❑ **Fuglar í Norðurhøvum**
- ❑ **Stjórnarskipanarmálið 1946**
- ❑ **Spell at sólin kom upp**
- ❑ **Politiska søga Føroya 1814–1906**
- ❑ **Føroyskir soppar**
- ❑ **Døgurðabókin**
- ❑ **Søgan um eplið**
- ❑ **Heimsatlas**
- ❑ **Mannakroppurin – og hvussu hann starvar**
- ❑ **Alfagurt ljóðar mín tunga (fløga/ljóðband)**

Bøkur og annað tilfar
– bæði innan og uttan skúlagátt.

FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR